## Mentamálaráðið

# Skúlastjóri í Fuglafjarðar Skúla

**Starvið sum skúlastjóri í Fuglafjarðar Skúla verður lýst leyst til setanar frá 15. mai 2009**

**Í Fuglafjarðar Skúla eru 291 næmingar í 1. – 10. fl., og tað starvast 33 lærarar og hjálparfólk í skúlanum.**

**Høvuðsuppgávur skúlastjórans eru**
- at standa á odda fyri framhaldandi menning á námsfrøðiliga og fyrisitingarliga økinum
- at fremja góðar arbeiðsumstøður, trivnað og gott samstarv millum næmingar, lærarar og onnur samstarvsfólk skúlans
- at skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri ávirkan og samábyrgd
- at fremja gott samstarv millum skúla og heim og eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt

**Harumframt skal stjórin seta í verk**
- menningarætlan fyri skúlan
- ítøkiligar broytingar samsvarandi visjón Mentamálaráðsins
- eina HR-ætlan fyri skúlan

**Vit bjóða**
Eitt spennandi starv við nógvum ymiskum uppgávum. Tú fært góðar møguleikar fyri fakligari og persónligari menning og fert at taka lut í leiðsluútbúgving, sum Mentamálaráðið skipar fyri.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalærara útbúgving, hava nomið ella nema sær góðkenda leiðsluútbúgving og hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

Harumframt er tað ein fyrimunur, at umsøkjarar hava
- leiðsluroyndir frá almenna- ella privata arbeiðsmarknaðinum
- góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt mennandi leiðslustíl
- vilja og evni at royna nýggjar leiðir
- áhuga fyri avbjóðingum

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Fuglafjarðar Skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.

Starvið verður lønt í lønarflokki 36.1 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag, og er lønin 1. oktober 2008 kr. 36.823,51. Starvið verður sett sum sáttmálasett starv uttan so, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir**
Umsókn saman við prógvi, C.V. o.ø. skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 16. apríl 2009 kl. 14.00.

Umsóknin verður stílað til:
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra, á tlf. 355050, ella fara á heimasíðu ráðsins: www.mmr.fo (undir teiginum leys størv).

**Mentamálaráðið**
Postrúm 3279 · 110 Tórshavn · Telefon 35 50 50 · Telefax 35 50 55 · e-postur.: mmr@mmr.fo

## MRCC / TR

# Vaktgangandi starvsfólk til MRCC-Tórshavn

Eitt starv sum vaktgangandi á MRCC-Tórshavn (Maritime Rescue Co-ordination Centre) er leyst at søkja.

**Starvið inniber hesar uppgávur:**
- Skiftandi vaktir og ábyrgd av vaktini.
- Tilkallivakt.
- Móttaka fráboðanir og taka støðu til hjálparveitingar á føroyskum sjóøkið.
- Vanligt fyrifallandi arbeiði á vaktini, t.d. skráseta ymiskt í sambandi við tilbúgvingina

**Førleikakrøv:**
- Nautiska ella aðra viðkomandi útbúgving
- Duga at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum
- Kunnleika til teldur
- Fullgilt GMDSS prógv.

**Setanartreytir:**
Starvið er lønt í 28. lønarflokki sambært avtalu millum Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmálaráðið. Starvsheitið er eftirlitsfólk.

Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og

Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er MRCC-Tórshavn.

**MRCC bjóðar:**
Eitt avbjóðandi starv, sum virkar undir altjóðareglum hjá IMO og føroyskum lógarverki.

Ískoytislæru um: Leiting og bjarging og hvussu farast skal fram.

**Persónligir eginleikar:**
Kunna arbeiða sjálvstøvugt. Vera fyrikomandi og duga at samstarva við allar partar í tilbúgvingini her á landi og í útlandinum.

**Meira fæst at vita:**
Um starvið við at venda sær til MRCC- Tórshavn, Robert J. Olsen, tlf. 351302, far.tlf. 231311 ella teldupost manager@mrcc.fo

**Umsóknir:**
Saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu verða MRCC-Tórshavn, Tinghúsvegur 64, Postrúm 1120, 110 Tórshavn í hendi áðrenn mánadagin 04. mai 2009 kl. 14.00.

Selja bilin?
– set hann í Sosialin!




Hevur tú ein bil til sølu, so er Sosialurin rætti miðilin at lýsa í.

Tú kanst lýsa við og uttan mynd.

Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.

Sosialurin
– blaðið øll lesa!

Sosialurin
Postboks 76
FO-110 Tórshavn
post@sosialurin.fo

Veitst tú eina góða?

Ring til Sosialin
tlf 341800



